# Flogbóltsdagur á Venjingarskúlanum



Sum liður í at fjøltátta ítróttarundirvísingina á Venjingarskúlanum skipar skúlin í morgin fyri stórari flogbóltskapping. Frá klokkan 8 á morgni fara allar næmingarnir í 6. til 9. flokki at kappast, og verður hetta í Ítróttarhøllini á Hálsi.

– Hetta er eisini fri at vísa á, at ítróttur umfatar meira enn bara fótbólt. Vit royndu hetta í fjør, og tað eydnaðist framúr væl, og umframt flogbóltin fara vit eisini at skipa fyri serstøkum kappingardøgum í øðrum ítróttagreinum seinni í ár, sigur Marilyn Danielsen, sum er ein av lærarunum handan kappingina.

Marilyn heldur annars, at júst ein slíkur leistur vildi verið upplagdur hjá fleiri skúlum at arbeitt eftir. Eitt nú kundi tað verið eitt fínt hugskot, um besti liðini hjá einstøku skúlunum seinni kappaðust um eitt veruligt skúlameistaraheiti innan ymsu greinarnar.

-mørk

## Toppdystur í Hoyvíks-høllini

**Toppdystur verður í meistaradeildini hjá monnum í kvøld, tá Fram tekur ímóti odda-liðnum ÍF. Vinnur Fram dystin, so er status quo í oddinum í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Síðsta vikuskiftið fekk ÍF sítt fyrsta tap í meistaradeildini hjá monnum, tá teir vitjaðu hjá Mjølni í Klaksvík. ÍF tapti dystin 3-0, men munurin á liðunum var ikki tann heilt stóri.

Samstundis sum Mjølnir vann á ÍF, so megnaði Fram eisini at vinna sín dyst ímóti Fleyr, so nú er veruligur spenningur komin í oddin í bestu mansdeildini, har trý lið liggja jøvn við átta stigum. ÍF hevur tó leikt ein dyst færri enn bæði Mjølnir og Fram.

Í kvøld verður so aftur oddabrak á skránni, tá ÍF vitjar Fram í Hoyvíks-høllini. Í triðja umfari møttust júst hesi bæði liðini á Kambsdali, og tá gjørdist ÍF drúgvara liðið. Fuglfirðingarnir vunnu tann dystin 3-1, og løgdu seg tá einsamallar á odda.

Nú fær Fram møguleikan at hevna tapið á Kambsdali, og um teir megna at vinna í kvøld, so kunnu teir fyribils leggja seg einsamallar á odda bestu mansdeildini. Hjá ÍF ræður eisini um at vinna dystin fyri at koma aftur á rætta kós, og megna teir hetta, so vera teir aftur á odda.

# Hendrik er framvegis bestur

**Við 34,35 eygum í meðal var Hendrik Petersen so klárt bestur, tá hann um vikuskiftið vann Haldor Holm kappingina í billard**

BILLARD
*Tíðindaskriv*

So rullaðu kúlurnar aftur á grøna klæðinum. Billard-kappingarárið byrjaði við stóru Haldor Holm kappingini í Klaksvík seinasta vikuskiftið. Fimm av landsins frægastu spælarum brustu saman í hesi fyrstu og spennandi billardkappingini á árinum. Endin varð, at Hendrik Pedersen, sum hevur vunnið kappingina fimm ferðir áður, aftur hesaferð fór við gullinum. Og tað var ongantíð nakar ivi um, at Hendrik fór at vinna, tí hann setti seg í respekt frá fyrsta til seinasta dyst við framúr góðum billardspæli. Hendrik hevði eitt miðaltal uppá 34,35 eygu, tá avtornaði. Nr. 2 og silvurvinnari gjørdist Kristian Suni Høgnesen við 25,90 eygum í meðal. Nr. 3 og bronsuvinnari varð Jan Müller við 21.78 eygum í meðal. Nr. 4 og 5 í kappingini vóru Carsten Hansen og Sonhard Johannessen.

Besta spælið í kappingini var uppá 916, og tað átti Hendrik. Kristian Suni átti besta umfarið uppá 166 eygu. Sum eitt lítið kuriosum kann nevnast, at Jan vann dystin móti Hendrikki við 660 eygum móti 532. Hetta man vera ein tann besti dysturin Jan hevur spælt í billard í mong ár.



*Teir tríggir bestu í Haldor Holm kappingini í ár. Fv. Kristian Sune Høgnesen, silvurvinnari, Hendrik Pedersen, gullvinnari og Jan Müller, bronsuvinnari*

Kappast hevur verið um Haldor Holm steypið síðani 1989. Kappingin er umframt at vera til minnis um tað arbeiði, sum Haldor gjørdi fyri billardspælið, eisini upphitingin til sjálva FM-kappingina. Teir fimm bestu spælararnir frá FM kappingini árið fyri sleppa við til hesa kapping.

### FM-kappingin

Minkandi undirtøkan fyri billardspælinum hevur gjørt, at Billardsamband Føroya hevur tikið avgerð um at broyta kappingina fyribils sum eina roynd. Higartil hava tríggir mans verið á hvørjum liði. Til komandi FM kapping verða so bert tveir mans á liðunum. Talan verður um dupultkapping, tvs. at luttakararnir spæla tvær ferðir móti hinum liðnum, soleiðis at talan verður um tilsamans 8 dystir í hvørjari kapping. Sjálv kappingin byrjar í desember. Tey feløg, sum ætla sær at luttaka í kappingini í ár, skulu venda sær til Kristian Suna Høgnesen, telf. 775432/258055 og Steinbjørn í Dali 217366.

# Bæði ætla sær sigurin

**Bæði Kyndil og Stjørnan ætla sær sigurin í bestu kvinnudeildini, tá hesi møtast í høllini á Hálsi í kvøld. Hjá Stjørnuni er Alina Olaru ikki heilt á toppinum enn, meðan Kyndil má vera Randi Wardum og Bjørg Syderbø fyri uttan.**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møtast í høllini á Hálsi í kvøld, tá Kyndil tekur ímóti Stjørnuni. Hóast hetta er toppur og botnur, so kunnu fólk vænta ein spennandi dyst, tí munurin á liðunum í Sunset deildini er ikki stórur í ár.

Í vikuskiftinum tapti Kyndil tepurt í Vági. Eftir at hava verið aftanfyri við heili 9 málum megnaði Kyndil at kempa seg aftur í dystin, sum tær at enda taptu við tveimum málum, og hetta er ein staðfesting av, at Kyndil er á rættari leið.

Til dystin ímóti Stjørnuni má Kyndil vera bæði Randi Wardum og Bjørg Syderbø fyri uttan, men Jórun Ludvig sigur, at tær ætla sær bæði stigini ímóti Stjørnuni.

- Síðstu dystirnar hevur mangla so lítið í hjá okkum. Vit hava brent alt ov nógvar opnar møguleikar, og hetta mugu vit bøta um. Megna vit at skora upp á okkara møguleikar í kvøld, so haldi eg heilt víst, at vit kunnu vinna dystin.

### Alina ivasom

Hjá Stjørnuni hevur gongdin ikki verið so góð síðstu dystirnar. Teirra seinasti dystur var eisini í Vági, har tær blivu hølvaðar av av einum vælleikandi VB-liðið. Í kvøld fáa stjørnurnar so ein møguleika at vaska ósigurin í Vági av sær.

Einasta ivamál hjá Stjørnuni er Alina Olaru, men Henrik Gerster vónar, at hann kann nýta hana í pørtum av dystinum. Annars væntar hann ein harðan dyst ímóti Kyndli.

– Leikara fyri leikara hevur Kyndil eitt sera gott lið, og tær kunnu spæla upp ímóti øllum liðunum í landinum. Vit ætla tó at vinna dystin, men vit mugu heilt víst spæla upp til okkara besta, um hetta skal lata seg gera.